Álit

í

løgtingsmáli nr. 111/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veg- og umhvørvisgjald av motorakførum o.a. (Vektgjald fyri allar persónbilar)

Jenis av Rana og Steffan Klein Poulsen, løgtingsmenn, hava lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 21. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2., 18. og 23. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við SEV, landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, saman við Akstovuni og Landsverki, landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, saman við Umhvørvisstovuni, og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) heldur, at uppskotið er áhugavert, tí at tað viðger, hvussu innkrevjing av vegskatti fer fram og greinar rættiliga neyvt, hvussu skipanin við ávikavist vektgjaldi og umhvørvisgjaldi er; hvør kostnaðurin er, og hvat landskassin fær inn fyri hesar skipanir í mun til tal av bilum. Soleiðis sett upp er tað eitt gott íkast í at viðgera politikkin at skunda undir grøna orkuskiftið.

Uppskotið leggur upp til, at innkrevjingarskipanin fyri vegskatt skal fara aftur til, at øll akfør skulu gjalda vegskatt eftir vektgjaldsprinsippinum (eldri leistur), og ikki sum nú, at el-bilar og akfør, sum gjalda umhvørvisgjald (nýggjur leistur), í miðal sbrt. uppskotinum gjalda umleið 400 kr. minni fyri hvørt akfar, enn tey, sum gjalda eftir vektgjaldi, og her el-bilar isolerað gjalda munandi minni enn tað fyri hvørt akfar. Grundgevingin er, at landið missir ov nógvar inntøkur av stuðlinum til grøna orkuskiftið, eins og uppskotssetararnir siga, at stuðulin til el-bilar vendir skeivt sosialt. Ein onnur grundgeving hjá uppskotssetarunum er, at innkrevingin skal gerast einfaldari.

Fyrst er at siga, at skiftandi samgongur og teirra landsstýri hava sett í verk, longt og tillagað stuðulsskipanir til grønar orkuloysnir síðani 1. januar í 2017, tá verandi skipan við umhvørvisgjaldi í staðin fyri vektgjald varð sett í gildi, við fyrimunum fyri umhvørvisvinarligari bilar. Sambært viðmerkingunum til ta lógarbroytingina (lm. 27/2016) vóru fortreytirnar fyri skiftinum frá vektgjaldi til umhvørvisgjald

- at umhvørvisgjaldið skuldi ikki ávirka verandi bileigarar fíggjarliga
- at brúkarin skuldi við umhvørvisgjaldinum hava møguleika at velja, soleiðis at hann fekk ein fíggjarligan fyrimun frá landinum, um hann valdi ein meira umhvørvisvinarligan bil fram um ein minni umhvørvisvinarligan, tá ið hann útvegaði sær nýggjan bil
- og at landskassin skuldi hava á leið somu inntøkur frá umhvørvisgjaldinum, eftir at vektgjaldið var lagt um til umhvørvisgjald.

Meirilutin heldur, at tað hevði verið skilagott, at landsstýrið eftirmetti, um skipanin við umhvørvisgjaldi og vektgjaldi enn virkar eftir upprunaætlanini og eftir nevndu fortreytum, eisini í mun til inntøkur landskassans.

Viðvíkjandi evninum, um landskassin missir pening av tiltøkum at fremja grøna orkuskiftið, so er at siga, at ein meiriluti í Løgtinginum samtykti ein veðurlagspolitikk í mai 2022 (lm. 130/2021), har ein partur er tileggjandi stuðulsskipanir, og ein partur er krøv og avgjøld.

Í samtykta veðurlagspolitikkinum er millum tey 25 átøkini, at MVG-afturbering skal veitast, tá el- ella vetnisbilur verður keyptur, at frítøka fyri virðisgjald skal galda, tá el- ella vetnisbilur verður keyptur og at MVG-frítøka framhaldandi skal galda, tá ein útvegar sær góðkenda hitapumpu.

Seinasta samtykta lógaruppskotið innan hetta økið er lm. 55/2023 um at gera stigvísu minkingina í afturberingini av meirvirðisgjaldi fyri grønar hitaskipanir meira lagaliga. Eisini eru uppskot samtykt í seinastuni, sum stigvíst niðurlaga omanfyrinevndu frítøku og afturbering til el- og vetnisbilar.

Tøkniliga menningin arbeiðir í síni ferð og marknaðurin lagar seg til givnar tøkniligar og lógarásettar treytir.

Stutt kann sigast, at nógv er eftir at gera fyri at fremja grøna orkuskiftið, men nógv ymiskt er eisini hent á hesum øki í Føroyum seinastu 10 árini, bæði umlegging frá vektgjaldi til umhvørvisgjald við fyrimuni fyri umhvørvisvinarligari bilar, stuðul til at útvega sær hitapumpur til upphiting av húsum og stuðul til el- og vetnisbilar gjøgnum MVG-afturbering og frítøku fyri virðisgjald. Og hesum politikki hava allir flokkar á Løgtingi arbeitt við og tikið undir við.

Tó hava uppskotssetararnir grein í sínum máli um, at júst hesin fyrimunurin í vegskattinum, sum el- og vetnisbilar hava, er ikki nevndur í samtykta veðurlagspolitikkinum og hevur sjáldan verið viðgjørdur politiskt, síðani hendan skipan við umhvørvisgjaldi við fyrimuni fyri el- og vetnisbilar í staðin fyri vektgjald varð ásett við lóg í 2016 og fekk virknað frá 1. januar 2017.

Verandi uppskot fer øgiliga bragdliga til verka og vil avtaka skipanina við umhvørvisgjaldi í einum høggi frá 1. juli í ár. Uttan at taka endaliga støðu til sjálva skipanina, so metir meirilutin, at tað er ov knappligt at avtaka skipanina í ár og við so stuttari freist.

Hetta skjýtur minnilutin í Fíggjarnevndini tó við broytingaruppskoti upp at gera lagaligari, soleiðis at man 1. januar 2025 byrjar við hálvum vektgjaldi fyri el- og vetnisbilar fyri síðani í eini líðandi skiftistíð uppá trý ár at fara uppá fult vektgjald.

Meirilutin heldur tó framvegis, at hetta er ov knappligt. Ístaðin heldur meirilutin, at tað eigur at verða greinað nærri, um skipanin við umhvørvisgjaldi heldur enn vektgjaldi er at rokna sum ein varandi skipan, og um so er, hvussu hon skal síggja út í framtíðini, serliga við atliti at sliti á vegakervið og at umhvørvisárini, og harvið um landskassin fær røttu inntøkurnar til at røkja vegakervið.

Tí metir meirilutin, at tað er rættast, um landsstýrið tekur hesa skipan við umhvørvisgjaldi í mun til vektgjald við í sína samlaðu eftirmeting av stuðulsskipanum til grøna orkuskiftið, so støða kann takast til, um hendan skipan eins og aðrar skal niðurlagast stigvíst, og um so er, nær hendan niðurlaging skal byrja, og á hvønn hátt hon verður niðurlagað, og hvussu vegskattaskipanin skal síggja út í framtíðini. Meirilutin heitir tí á landsstýrið um at eftrimeta skipanina.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Grøni stuðulin í sínari heild hevur skjótt kostað landskassanum 500 mió. kr., og hesir pengar eru endaðir hjá teimum føroyingum, sum eru fíggjarliga væl fyri. Talan er tí um sosialan politikk sum vendir skeivt.

Ein partur av hesum stuðlinum er lagdur inn í vegskattin, sum hetta lógaruppskotið rættar uppá. Við galdandi lóg gjalda el- og vetnisbilar einans 1.500 kr. um árið í vegskatti eftir umhvørvisgjaldsstiganum, sum kom í gildi í 2017. Diesel bilar rinda 5.428 kr. og bensin bilar 3.028 kr. í miðal um árið eftir sama umhvørvisgjaldsstiga.

Tað merkir, at elbilar fara at rinda 1.500 kr. í alla framtíð, um lógin ikki verður broytt. Samstundis blíva bensin og diesel bilar grønari og fara harvið eisini at rinda minni og minni í umhvørvisgjaldi við tíðini.

Tað er serliga vaksandi talið av elbilum, sum kostar landskassanum í mistum inntøkum. Galdandi skipan hongur tí ikki fíggjarliga saman.

Fíggjarmálaráðið hevur váttað útrokningarnar hjá uppskotsstillarunum og váttar harvið, at landskassin missir nógvar milliónir kr. um árið við galdandi lóg. Akstovan hevur eisini váttað, at galdandi lóg kostar landskassanum og samstundis upplýst um, at generella talið av skrásettum bilum er minkað fyri fyrstu ferð í langa tíð.

Myndin av hvussu grønir elbilar eru, er meira nuanserað, enn fleiri gera hana til. Fyri at nevna nøkur dømi so slítast dekkini skjótari á elbilum, tunga vektin ger, at vegirnir slítast meiri, og eitt nú hevur verið frammi, at bremsurnar rusta skjótari enn á øðrum bilum. Spurnartekin kunnu eisini setast við, hvussu grøn battaríini eru. Hinvegin eru fleiri fyrimunir við elbilum, og í verandi løtu sær tað út sum, at elbilar eru framtíðin. Poengið er, at myndin er rættiliga samansett, tá vit skulu taka støðu til, hvussu grøn ein vøra er. Vit mugu ansa eftir ikki at "grønvaska" eina vøru, sum í veruleikanum kanska ikki er grøn.

Uppskotið snýr seg ikki um at vera fyri ella ímóti elbilum. Tað snýr seg um at seta rímiligar karmar fyri bilarnar í Føroyum. Minnilutin heldur ikki, at galdandi lóg er rímilig við tí í huga, at "grøna myndin" er sera samansett, og at grøni stuðulin vendir sosialt skeivt. Fíggjarliga er tað eisini ein óhaldfør skipan at lata elbilarnar rinda 1.500 kr. í alla framtíð.

Grønu stuðulsskipanirnar hava veruliga sett ferð á grøna orkuskiftið og hava harvið tænt sínum endamáli. Nú er tíðin til at fasa tær út. Tað kemur alt ov ofta fyri, at stuðulsskipanir ikki verða avtiknar aftur, sum Løgtingið hevur samtykt til ávíst endamál fyri eitt ávíst tíðarskeið.

Samtykti umhvørvispolitikkurin sigur onki um vegskattin fyri el- og vetnisbilar, men har stendur tó, at bensin og diesel bilar skulu rinda meira við tíðini. Her er vert at skoyta uppí, at summir elbilaframleiðarar eru longu byrjaðir at víkja frá málinum um bara at framleiða elbilar í 2030. Hetta

er eitt ítøkiligt dømi um, at vit ikki skulu læsa okkum ov fast, tá tað kemur til tann grøna politikkin, tí tøknin og marknaðurin flyta seg allatíðina.

Tað, sum hoyringarpartarnir hava víst á, er, at broytingar í stuðulsskipanum mugu fráboðast í góðari tíð. Støðan fyri íløgustuðul er eitt sindur øðrvísi. Í hesum førinum er talan um broyting í rakstrarstuðli við sera stuttum skotbrái, og hetta tekur minnilutin til eftirtektar.

Eitt broytingaruppskot er gjørt fyri at ganga hesum kritikkinum á møti, og harvið fellur meirinntøkan í ár burtur. Minnilutin heitir tó staðiliga á landsstýrið um, at eykainntøkan hjá landskassanum av hesum uppskoti í teimum komandi árunum verður raðfest til viðlíkahald av vegakervinum.

Tað er umráðandi, at hendan broytingin í vegskattinum kemur skjótast gjørligt. Tess longur vit bíða, tess fleiri keypa sær ein elbil við tí fortreyt, at vegskatturin einans er 1.500 kr. um árið. Tað verður tí ikki lættari at koma við eini slíkari broyting sum frálíður men tvørturímóti.

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1 verður orðað soleiðis:
”

§ 1

Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um veg- og umhvørvisgjald av motorakførum o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 12. desember 2018, verða í § 3, stk. 1 1. og 2. pkt. strikað, og í staðin verður sett:
“Fyri motorakfør undir 3.500 kg verður árliga gjaldið rindað sambært gjaldsskrá í skjali 1. Sama er galdandi fyri motorakfør úr 3.500 kg, legu- og viðfestisvognar og motorsúkklur, skrásett áðrenn 1. januar 2017. Gjaldið sbrt. 1. og 2. pkt. verður tó fyri motorakfør, ið bert nýta ravmagn ella vetni til framdrátt, avmarkað soleiðis, at tey í 2025 rinda 50% av vektgjaldinum, í 2026 rinda 66,67% av vektgjaldinum, í 2027 rinda 83,33% av vektgjaldinum og í 2028 og árini fram fult vektgjald.”.

2. Í § 2 verður ”1. juli 2024” broytt til: ”1. januar 2025”.

Viðmerkingar
Við hesi broyting fara elbilar so líðandi at byrja at rinda vektgjald yvir eitt áramál, soleiðis at teir frá 2028 og fram rinda fult gjald. Byrjað verður við hálvum gjaldi í 2025, og síðani hækkar gjaldið við 16,67 prosentstigum um árið fram til 2028.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 8. mai 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	